# Partabrøv skulu vera ein handilsvøra

**Manglar eitt flakavirki pengar, er tað ofta bygdafólkið, sum setir í – tí tey vilja varðveita eitt arbeiðspláss. Men fáa vit í staðin fólk at seta í, tí tey vænta sær vinning, verður lættari hjá virkjum at fáa pengar. Tí arbeiðir ein nevnd við at gera ein partabrævamarknað í Føroyum.**

KATRIN PETERSEN

Tá eitt partafelag má hava meira eginpening, er ofta bara ein leið hjá nevndini at ganga – hon má út til familjuna, bygdafólkið ella peningastovnarnar at vita, um ikki onkur er, sum hevur hug at seta pengar í. Men fær Anfinn Kallsberg sín vilja, skal tað verða lættari hjá flakavirkjum, skipum og øðrum at skaffa sær pengar, tá tey skulu keypa nýggja útgerð ella byggja út. Hann hevur sett eina nevnd, sum kannar, hvussu ein føroyskur kapitalmarknaður kann gerast.

– Ein marknaður er eitt stað, har seljari og keypari møtast. Vit høvdu ikki hugsað okkum, at hetta skuldi verið ein børsur – sum tann í Keypmannahavn – tí tað hevði verið óyvirkomiligt. Men eitt marknaðarpláss, har tað bar til at keypa og selja partabrøv, og har allir handlar verða skrásettir, er gjørligt, sigur Kaj Johannessen úr Landsbankanum.

Hann situr í nevndini, sum Anfinn Kallsberg vil hava at arbeiða við hesum marknaði. Eisini hevur hann sitið í arbeiðs-bólkinum, sum gjørdi álitið um peningarensl milum Føroyar og Danmark. Í tí álitinum stendur, at brúk er fyri onkrum slagi av partabrævamarknaði, skal fiskivinnan gerast sterkari.

– Tað løgna er, at føroyska fiskivinnan traditionelt hevur havt lítla eginogn. Tað er lítið trúligt, at okkara høvuðsvinna fæst at verða ein sterk og kappingarfør vinna uttan størri eginogn, skrivar arbeiðsbólkurin.

## Vanligt við lítlari eginogn

Vandin í at hava ov lítið av eginpeningi er, at tá skal ikki nógv til, áðrenn fyritøkan fer á húsagang – hon tolir lítið av. Men kortini hevur verið vanligt, at tey, ið hava stovnað partafeløg í 80-unum, hava hildið seg verið væl fyri, tá tey hava havt tíggju prosent av pengunum, tey skuldu brúka. Skuldi eitt nú eitt skip keypast, bar til at læna 90 prosent av tí, skipið kostaði, úr peningastovnunum – tí hildu skipaeigararnir seg ikki nýt-ast at hava meira enn tíggju prosent í eginogn.

Tá ein virkis- ella skipaeigari hevur fingið fyri seg, at eginognin í felagi hansara er nóg stór, tí hon er tíggju prosent, ger hann onki fyri at fáa fólk at seta meira pengar í hjá sær. Og gongur væl hjá honum, er heldur ongin orsøk til at fáa meira eginpening. Men serstakliga fiskivinnan er í vanda, hava partafeløgini ikki tryggjað seg væl við at hava í meira lagi av eginogn.

– Fiskivinna og aðrar vinnur, sum eru merktar av ógvusligum broytingum við upp- og niðurgongd, seta stór krøv til støddina á eginognini. Er hon ikki nóg stór, renna virkini seg føst í niðurgangstíðum, og sleppa illa burtur úr naggatíðnini eftir hetta, stendur í álitinum »Partabrævamarknaður og eginpeningsviðurskifti«, sum kom út í summar.

## Agn má til

Ein marknaður, har fólk seldu og keyptu partabrøv, hevði kunnað hjálpt virkjum, so tey betur fingu gjørt íløgur, tá tær vóru neyðugar – um nakar vildi selt partabrøv, ella keypt tey.

– Ein kann spyrja, hvør hevði farið á ein sovorðnan marknað og selt partabrøv. Tær fyritøkurnar, ið ganga væl, hava kanska ikki brúk fyri at fara út á ein marknað – tí tær fáa fígging kortini. Tær fyritøkurnar, sum ikki ganga so væl, hava kanska ilt við at sleppa av við partabrøvini, sigur Kaj Johannessen.

Skal ein sovorðin marknaður virka, má eitt agn vera. Fólk, ið eiga pengar, seta teir í bankan, um ikki onkur kann sannføra tey um, at tey fáa meira burturúr at fara á marknaðin og seta pengar í onkra fyritøku.

– Í Føroyum er tað ofta soleiðis, at fólk seta pengar í eitt nú flakavirki, tí tey vilja varðveita eitt arbeiðspláss. Verkamannafeløg og privatfólk seta tað í, tey hava spart upp. Men skal ein marknaðarstaður virka, mugu fólk seta pengar í fyri at fáa teir at forrenta seg, sigur Kaj Johannessen.

Í øðrum londum eru tað ofta íløgufeløg, sum eru á marknaðinum – men fleiri og fleiri privatfólk vilja seta uppsparingina í onkra fyritøku.

– Aðrastaðni hava tey feløg, sum gera íløgurnar fyri fólk. Hetta felagið fær fólk at keypa eitt innskotsprógv. Tá so nógv gera tað, fer felagið út og keypir partabrøv fyri pengarnar. Fyrimunurin er, at hetta felagið kann leggja íløgurnar ymsa staðni – tað nýtist ikki at avmarka seg til eina fyritøku. tí verður avkastið hampuliga stórt, meðan váðin er lítil, sigur Kaj Johannessen.

## Skattafyrimunir til keyparar

Men eisini eitt sovorðið felag má hava onkran, sum vil selja – og tað eru ikki øll, sum vilja tað.

– Eg kann nevna Dandy-fyritøkuna í Danmark sum dømi um eina fyritøku, sum ikki vil á partabrævamarknaðin. Hon kundi saktans gjørt tað, og fingið nakað burtur úr tí, men vil heldur vera ein familjufyritøka – ongin annar skal sleppa inn.

Familjufyritøkur eru eisini í Føroyum í stórum tali – spurningurin er, um tær høvdu bjóðað seg fram á marknaði. Men hetta kann broytast frá almennari síðu. Eisini fyritøkum kann egnast fyri.

– Fyri at vekja áhuga fyri partabrævaíløgum verður mælt til, at skipan verður gjørd, sum gevur fyritøkum og einstaklingum skattligan fyrimun fyri ávísa upphædd, tá partabrøv verða keypt, stendur í álitinum um eginpening.

Hesin skattafyrimunur kann síðani minkast, tá fólk hava vant seg við at brúka ein partabrævamarknað, halda fólkini, sum kanna møguleikarnar fyri einum partabrævamarknaði.


BÓKASØLAN

**Um tú vilt vita meira**

**It's a long way to Tipperary**




Hvussu var at giftast til Onglands, at fáa eitt barn uttan fyri hjúnarlag ella at vaksa upp sum hermannabarn?
Les hvat tey sjálvi siga.

*Kirstin Didriksen*
**Kærleiki undir krígnum**
Kr. 215,-

**Bókasølan**
SMS • Tel. 19575


**Løgmaður:**

# Marknatrætan skal loysast fyrst

**Edmund Joensen, løgmaður, er av tí áskoðan, at eitt gott undirgrundarmark hevur størri týdning enn ein skjót byrjan av oljuleitingum. Hetta svaraði hann Henriki Old í tinginum fríggjadagin, tá lógin um kolvetnisvirksemi var til fyrstu viðgerð.**

INGI RASMUSSEN

– Vit eiga at gera okkum greitt, at vit fara ikki at bjóða út øki til oljuleitingar, um tað skaðar okkara møguleikar fyri at fáa tey landgrunsøki, sum vit meta okkum at eiga rættin til, sigur Edmund Joensen.

Løgmaður heldur, at gongdin í marknamálinum hevur staðfest, at betri hevði verið, um markið var komið uppá pláss, áðrenn allar fyrireikingar til oljuvinnu fóru í gongd.

Tá fyrsta viðgerð av oljulóggávuni var fyri í løgtinginum, spurdi Henrik Old løgmann, um hann framvegis helt fast við, at marknatrætan skal loysast, fyrr enn boðið verður út at gera royndarboringar.

Løgmaður segði, at landgrunsmarkið millum Føroyar og Bretland ikki er endaliga ásett.

Hann segði somuleiðis, tá hann legði uppskotið fram, at partarnir í einum marknastríði sambært altjóða rætti ikki eiga at taka stig, ið kunnu skaða ella forða fyri eini endaligari samráðingarloysn – eitt nú eiga umstridd øki ikki at verða boðin út.



**Edmund Joensen heldur ikki, at vit eiga at bjóða øki út til oljuboringar, fyrr enn marknatrætan millum Føroyar og Bretland er avgjørd**

Løgmaður heldur, at vit ikki eiga at tosa ov nógv um hetta málið nú, tí marknasamráðingarnar eru í trúnaði, og umrøða av málinum kann lættliga gera størri skaða enn gagn.

– Kannað verður í løtuni, um tað er møguligt at bjóða út øki á landgrunninum, sum ikki eru rakt av marknastríðnum við Bretland, sigur Edmund Joensen, og leggur afturat, at hetta verður gjørt í vónini um, at fyrsta útbjóðingarumfar skal fara av bakkastokki longu í 1998.

# Fríhandilssátmáli undirskrivaður hósdagin

Hósdagin verður fríhandilssáttmáli undirskrivaður millum Føroyar og Estland. Hetta er tann fyrsti í eini røð av sáttmálum, sum landsstýrið ætlar at fáa í lag við eystanlondini.

Forsætismálaráðharrin í Estlandi, Mart Siimann, kemur til Føroya á vitjan 27. og 28. november í sambandi við, at Føroyar og Estland eina tíð hava fyrireika sáttmálan sínámillum.

Fyrr í ár var løgmaður á almennari vitjan í Estland saman við umboðum úr føroyska vinnulívinum. Síðani hava samráðingar verið á embætismannastigi, og endaliga úrslitið av hesum sæst klokkan trý hósdagin, tá løgmaður Edmund Joensen og forsætismálaráðharrin Mart Siimann fara at skriva undir úti í Tinganesi.


**KANSKA ERU 99 KRÓNUR* Í SO LÍTIÐ?**

**1. – 2. DES.** Golf: Skins Game frá Palm Desert, Californien við Tiger Woods, Mark O'Meara, Fred Couples og Tom Lehmann. Einans á TVS.

**3. DES.** Kurvabóltur: EM-Semifinala fyri menn. Danmark-Israel. Einans á TVS.

**4. – 7. DES.** Golf: 1997 Nedbank Million Dollar Golf Challenge, Sun City: 10 av heimsins bestu golfspælarum dystast m.a. Faldo, Langer, Els, Lehmann, Montgomerie, J. Leonard, Parnavik og Lowe. Beinleiðis. Einans á TVS.

**4. DES.** Íshockey: Elitudeildin Rungsted-Gentofte. Beinleiðis. Einans á TVS.

**6. DES.** Fótbóltur: Premier League. Liverpool-Manchester U. Beinleiðis. Einans á TVS.

**7. DES.** Fótbóltur: Hollendska Heiðursdeildin. Willem II-Feyenoord. Beinleiðis. Einans á TVS.

**8. DES.** Flogbóltur: Meistaradeild menn. Fortuna-DHG. Beinleiðis. Einans á TVS.

**9. DES.** Fótbóltur: UEFA Cup. 3 umfar returdystur. Hygg í bløðini. Einans á TVS.

**10. DES.** Hondbóltur: 1. deild menn. Virum-Roar. Beinleiðis. Einans á TVS.

**11. DES.** Íshockey: Meistara deildin: Rødovre-Hvidovre. Beinleiðis. Einans á TVS.

**13. DES.** Fótbóltur: Premier League. Hygg í bløðini. Beinleiðis. Einans á TVS.

**14. DES.** Fótbóltur: Hollendska Heiðursdeildin. Volendam-Ajax. Einans á TVS.

**16. DES.** Kurvabóltur: Steypafinalur menn og kvinnur. Hygg í bløðini. Beinleiðis. Einans á TVS.

**17. DES.** Flogbóltur: Landsdystur m/k. Danmark-Svøríki. Beinleiðis. Einans á TVS.

**18. DES.** Hondbóltur: 1. deild menn. Helsingør-Virum Sorgenfri. Beinleiðis. Einans á TVS.

**20. DES.** Fótbóltur: Primera Liga. Barcelona-Atletico Madrid.

**20. – 21. DES.** Hondbóltur: Super Cup. Semifinalur/finalur. Menn. Barcelona-Kolding. Bidason-Virum Sorgenfri. Finala. Hygg í bløðini. Einans á TVS.

**21. DES.** Fótbóltur: Hollendska Heiðursdeildin. Ajax-PSV. Beinleiðis. Einans á TVS.

**26. DES.** Fótbóltur: Premier League. Aston Villa-Tottenham. Beinleiðis. Einans á TVS.

**26. – 29. DES.** Badminton: Copenhagen Masters. Poul E. Høyer og Camilla Martin eru forsvarandi meistarar. Beinleiðis.

**27. DES.** Hondbóltur: Steypasemifinalur menn. Hygg í bløðini. Beinleiðis. Einans á TVS.

**29. DES.** Flogbóltur: Landsdystur. Danmark-Rumænia. Einans á TVS.

**30. DES.** Íshockey: Steypafinala. Beinleiðis. Einans á TVS.

Hetta er einans ein lítil úrdráttur av øllum tí, TVS sendir í desember mánaði.
Ring nú 0 38 48 35 53 og tekna teg sum haldara.
Tað kostar einans 99 kr.* um mánaðin, um tú teknar 12-mánaða haldaragjald.

TV S
DEN DANSKE SPORTSKANAL
* Uttan dekodara leigu og kortgjald